# Skjótt letur Navia upp í hjartanum í høvuðsstaðnum




**– Í fyrstani, tá vit fingu lyklarnar til handilin, kendist alt eitt sindur fremmant, men tað gekk bara ein stutt tíð, so gjørdust vit ógvuliga góð við bygningin, sigur stjórin í Navia, Óli Kristian á Torkilsheyggi, sum viðgongur, at tey eru ógvuliga glað fyri, at tey valdu at gera hesa íløgu í hugnaliga umhvørvinum í Vágsbotni**

*Vilmund Jacobsen*

Tað var í endanum av august í fjør, at Føroya størsti ullavøruhandil, sum er Navia á Toftum, keypti gamla handilsbygningin hjá Andreasi í Vágsbotni við yvirtøkudegi, sum var hin 10. september í 2024.

Tá hevði gamli handilin í Vágsbotni, sum læt upp 30. november í 1953, verið stongdur síðan hin 31. mars í 2021.

Men, søgan um gamla handilshúsið í Vágsbotni røkkur longur aftur enn tað.

Tey seinastu, sum róku handillin við dóttir Andreasi, Jónu Restorff Holm á odda, hava fortalt, at fyrsta parið av hvítbotnaðum gummiskóm varð selt hjá Zacharasi Heinesen longu hin 27. november í 1927 – ella fyri næstan hundað árum síðan.

Og hetta parið fór fyri seks krónur!

Eftir at Andreas Restorff Jacobsen byrjaði at handla í 1953, var hetta í fyrsta lagi ein matvøruhandil. Tá vóru ringar tíðir í Føroyum, men við nógvum arbeiði fingu tey tað at bera til, soleiðis at handilin var virkin øll árini fram til 2021.

Í 1974 varð sáðlað um frá at vera matvøruhandil til at gerast ein handil, sum meira legði seg eftir sjóklæðum, yviralsklæðum, stivlum og ymiskum øðrum klædnapløggum.

Sum árini gingu, og ferðavinnan í Føroyum mentist, samstundis sum fleiri og fleiri útlendsk ferðafólk komu til Føroya, varð vøruútboðið í handlinum eisini tillagað.

Ein stórur partur av útboðnum gjørdist nú bundin pløgg, serliga troyggjur og ymiskt annað, mest frá føroyskum veitarum, og her kundi tú keypa blusur og annað við føroyskum motivum ella áskrift og smærri prýðislutir – eisini við føroyskum motivum.

Øll árini vóru hvítbotnaðir og svartir gummiskógvar ein partur av útboðnum í Vágsbotni.

## Elsa klippir seyðbandið

Nú Navia eigur handilin í Vágsbotni, fer virksemi at halda fram í sama stíli sum áður – í dagførdum og hugnaligum hølum, har ymiskt kemur aftrat tí, sum handilin var so kendur fyri.

Hetta eru gamlir bygningar, sum krevja eina hond, um teir skulu varðveitast og halda fram at vera ein ímynd av Vágsbotni tey næstu nógvu árini.

Við stórari virðing fyri tí, sum var og teirri útsjónd, sum bygningurin hevur havt allar okkara dagar, hevur nýggi eigarin dagført allan tann partin, har handilshølini eru, bæði niðaru og ovaru hæddina, og leygardagin hin 12. apríl verður latið uppaftur.

Tá kemur Elsa Berg, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu, at klippa snórin, sum verður eitt seyðband úr Navia-tógvi, og handilin verður tá latin uppaftur fyri almenninginum.

Stjórin í Navia, Óli Kristian á Torkilsheyggi, sigur, at tey alla tíðina havt havt sum mál, at handilin skuldi lata uppaftur fyri páskir, og hóast nakað er eftir at gera enn, vissar hann um, at upplatingardagurin verður sum ætlað.

– Hetta er ein ógvuliga spennandi íløga og ein framúr staðseting í hugnaliga umhvørvinum í Vágsbotni. Í fyrstani, tá vit fingu lyklarnar til handilin, kendist alt eitt sindur fremmant, men tað gekk bara ein stutt tíð, so gjørdust vit ógvuliga góð við bygningin.

Stjórin í Navia sigur, at hann er ógvuliga glaður fyri, at tey valdu at keypa og gera hesa íløgu, og tá hann verður spurdur, um hetta er ein íløga, sum fer at loysa seg, er hann ikki í iva.

– Staðsetingin er so fantastisk, og hóast vit við keypi og dagføring hava lagt okkum í seðlarnar, trúgvi eg, at hetta er ein góð íløga fyri Navia.

## Ein totalrenovering

Tað var beinanvegin eftir yvirtøkuna í fjør heyst, at tey fóru í holt við at umvæla og dagføra handilshølini, og tað er ikki smávegis arbeiði, sum er gjørt, tí tey hava eisini verið langt niðri í móruni undir gólvinum á bygninginum.

– Bygningurin og handilshølini hava nú fingið eina totalrenovering, men vit hava lagt stóran dent á at varðveita sum mest av tí gamla, og her er framvegis nógv, sum sæst aftur av tí sum var.

Óli Kristian á Torkilsheyggi vísir á, at umframt at alt er grivið upp undir bygninginum, undirlendið er drenað, og stoypt er omanyvir aftur, er gólvið eisini nýtt.

– Allar syllarnar undir framsíðuni av bygninginum vóru rotnar. Her er stoypt uppundir, og nýggjar syllar eru lagdar.

Til stuttleikar nevnir stjórin, at tað var ein hæddarmunur á heilar 22 sentimetrar, har gólvið í niðaru hæddini var lægst, og har gólvið var hægst.

Hann vísir á, at neyðugt var at skifta alt gólvið í niðaru hæddini, men gólvið í ovaru hæddini er júst tað sama, sum var og onkrar gólvfjalar, sum vóru góðar í niðastu hæddini, eru brúktar í erva.

– Í øllum bygninginum hava vit lagt okkum eftir at varðveita sum mest, og í fyrsta lagi er tað stórviðurin, sum hevur verið rættiliga góður. Í niðaru hæddini eru berandi stútturnar tær somu, sum altíð hava verið her, og tær síggjast allar millum nýkløddu træveggirnar.

Hann vísir á, at skivan, sum var í niðaru hæddini í handilshølunum, tá tú komst innar, verður hin sama.

– Vit tóku skivuna heim á Toftir, har hon er tikin sundur og er sett saman aftur í upprunastand, har alt skelettið er júst, sum tað var. John Dávur Djurhuus, snikkari, tók sær hegnisliga av skivuni, sum nú kemur at standa longri inni á gólvinum í handilshølunum.

Sama er við einum diski, sum áður stóð inni í handilshølunum í niðaru hæddini og ymiskum øðrum, sum Navia hevur valt skal vera verandi í dagførdu hølunum.

– Vit hava skift trappuna, sum gongur upp í ovaru handilshølini, út við eina nýggja, sum er góð at ganga eftir hjá viðskiftafólki, sigur stjórin í Navia.




– Uttan er handilsbygningurin óbroyttur í útsjónd. Hetta er framvegis ein reyður bygningur við hvítum vindeygum, og vit fara eisini at syrgja fyri, at her framvegis verða hvítbotnaðir gummiskógvar at fáa, sigur Óli Kristian á Torkilsheyggi brosandi
*Myndir: Álvur Haraldsen*



# Skjótt letur Navia upp í hjartanum í høvuðsstaðnum … framhald

### Sera gott arbeiði

Óli Kristian vísir á, at loftini í báðum hæddunum eru júst tey somu sum vóru, og í ovaru hæddini er gólvið eisini hitt sama sum var.

– Allur bygningurin er bjálvaður, øll el-skipanin er skift, og vit hava fingið eina nýggja luft-til-vatn hitaskipan, sum eisini kann klára at hita tann partin av bygninginum, sum er hin elsti og sum ongantíð hevur havt hita.

Elsti parturin av bygninginum, sum er hin vestari, er fyrrverandi pakkhúsið hjá Ryberg, sum hevur sín uppruna heilt afturi í 1768.

– Hetta er tískil ein ógvuliga søguligur partur av bygninginum, og tá vit einaferð koma til tann partin, verður neyðugt at renovera allan bygningin. Í løtuni eru vit ikki komin til nakra endaliga niðurstøðu um, hvat vit fara at brúka henda partin til, men tað liggur í kortunum, at vit eisini fara at umvæla og dagføra hendan bygningin.

Tað er byggivirkið KBH á Toftum, sum stendur fyri høvuðsarbeiðnum í Vágsbotni, og Óli Kristian á Torkilsheyggi sigur, at fyritøkan hevur gjørt eitt sera gott timburarbeiði.

– Vit kenna hesa fyritøku, og vit vita, hvat teir duga. Jú, hetta er eitt fantastiskt arbeiði, sum KBH hevur gjørt. Vit eru eisini sera væl nøgdir við aðrar veitarar, sum eru við í verkætlanini.

Hann vísir á, at øll vindeygu og allar hurðar í handilsbygninginum eru skift, og alt er í sama stíli sum áður. Tað er Havnar Træsmiðja, sum hegnisliga hevur gjørt vindeygu og hurðar, og tað er eisini Havnar Træsmiðja, sum hevur gjørt snøggu og góðu trappuna, sum bindir handilshølini saman.

Zacharias Leitisstein hevur staðið fyri hita og saniteti, Jóan Magnus Gunrim hevur gjørt el-arbeiðið, og Páll Skýlingdal ger málaraarbeiðið.

### Tjóðsavnið er við

Óli Kristian vísir á, at tá tey fóru í holt við at umvæla og dagføra gomlu og søguligu handilshølini í Vágsbotni, ynsktu tey at hava Tjóðsavnið við.

– Vit vildu hava Tjóðsavnið við fyri at tryggja, at alt verður gjørt so rætt, sum tað nú einaferð ber til.

Hann sigur, at tey á Tjóðsavninum eisini hava filmað allan bygningin í 3D fyri at síggja og kunna varðveita vitanina um, hvussu ein slíkur bygningur í sínari tíð er bygdur.

– Soleiðis vóru tey eisini við, tá vit fingu móruna undan gólvinum og hava annars verið við í tilgongdini.

Stjórin í Navia vísir á, at eitt nú eru allar stútturnar í handisholunum útskornar. Hesar eru í góðum standi, tó at tær eru næstan 165 ára gamlar, og tær síggjast allar í niðaru hæddini í handilshølunum.

– Fýrur var í húsinum, har fuktur hevur verið, eitt nú í niðara gólvinum og bjálkunum, men ikki í stórviðinum annars. Soleiðis er fýrur ikki farin um alt húsið, men hevur hildið sær har, sum fuktur var – ella tætt uppat fukti, sigur Óli Kristian, sum leggur aftrat, at nú er allur fýrurin í handilshølunum burtur.

Hann vísir á, at træbrettini úr furu, sum klæða handilshølini innan, eru í somu breidd, sum tey vóru upprunaliga, men tey nýggju brettini eru nakað tjykri.

– Í ovaru hæddini hava vit lagt somu træbretti sum í niðaru, men í ovaru hæddini vóru áður brettir og plátur hvørt um annað – og onkustaðni var einki, soleiðis at tað sást inn á stórviðin, og her hevur ongantíð verið bjálvað.

> »Staðsetingin er so fantastisk, og hóast vit við keypi og dagføring hava lagt okkum í seðlarnar, trúgvi eg, at hetta er ein góð íløga fyri Navia«

Stútturs, bjálkar og loft eru júst tey somu, sum tey vóru longu í umleið 1861.

Nýggja úthurðin til handilshølini stendur framvegis í horninum í niðaru hæddini, har hon helst hevur staðið síðan síðst í 1920-unum, tá Zacharias Heinesen vildi hava hurðina her.

Í allari niðaru hæddini er nú gólvhiti.

– Uttan er handilsbygningurin óbroyttur í útsjónd. Hetta er framvegis ein reyður bygningur við hvítum vindeygum, og vit fara eisini at syrgja fyri, at her framvegis verða hvítbotnaðir gummiskógvar at fáa, sigur Óli Kristian á Torkilsheyggi brosandi.

### Útlendingar og føroyingar

Handilin hjá Navia í Vágsbotni fer eins og áður at venda sær til útlendsk ferðafólk, men her verður eisini nógv, sum føroyingar spyrja eftir. Her verða ullavørur, jakkar, stivlar, regnklæðir, og her verður ymiskt til gongutúrar og annað, umframt at stórur tógvhandil verður í ovaru hæddini.

– Her eru øll viðskiftafólk hjartaliga vælkomin, føroyingar sum útlendingar, og vit gleða okkum nógv til at bjóða fólki á gátt leygardagin hin 12. apríl, tá latið verður upp.

Óli Kristian á Torkilsheyggi sigur, at ymiskt verður øðrvísi, tá handilin letur uppaftur.

– Eg kenni frá mínum royndum, at útlendsk ferðafólk ofta spyrja eftir føroyskum mati, eitt nú skerpikjøti, rullupylsu og kjøtpylsu. Tað kann eisini vera ein ræstur hálsur, sum fólk hava hug at royna. Tí fara vit eisini at skipa so fyri, at fólk kunnu keypa sær ein bita av hesum út við.

Hann vísir á, at allur føroyskur matur, sum verður til sølu í niðaru hæddini, verður innpakkaður og fer at standa í kuldaskápum, soleiðis at eingin roykur stendst av hesum.

– Hugskotið um matin vendir sær serliga til útlendsk ferðafólk. Í staðin fyri at keypa sær okkurt suviners heim við, hava tey kanska heldur hug at royna føroyskan viðskera og føroyskan mat, sum tey fara at fáa høvi til í Vágsbotni.

Í ovaru hæddini, sum verður tógvhandil burturav, verður eisini møguleiki at seta seg niður frammanfyri vindeyguni og keypa sær ein kaffimunn við onkrum søtum afturvið. Her fara vit at hava eini 3-4 borð og stólar.

– Her verður kaffi frá Brell og okkurt søtt frá føroyskum veitara. Eg hugsi mær, at hetta kann vera eitt gott hugskot til mannin, sum kemur á gátt saman við konuni og kanska ikki hevur so stóran áhuga í tí, sum konan leitar eftir, sigur hann brosandi.

### Alt heldur fram

Stjórin í Navia sigur, at bæði handilin á Toftum og handilin í SMS, sum serliga vendir sær til føroyingar, fara at halda fram sum higartil.

– Vit hava stóran handil á Toftum, og fyri nøkrum árum síðan vórðu umvælingar og dagføringar gjørdar her við tí fyri eyga at skapa eitt spennandi og forvitnisligt umhvørvi fyri viðskiftafólkini.

Hann vísir á, at handilin á Toftum er innrættaður soleiðis, at hølið er sera opið og rúmligt, og á henda hátt fáa viðskiftafólk eitt gott yvirlit yvir allan handilin, sigur stjórin.

Navia byrjaði sítt virksemi í 2004, og í 2011 keypti fyritøkan Oyrahandilin á Toftum.

– Vit halda, at handilin hjá Andriasi í Vágsbotni er eitt spennandi handilshús í einum sera hugnaligum umhvørvi, og tí valdu vit at keypa bygningin og lata handilin uppaftur. Vit eru longu vorðin ógvuliga góð bygningin og vóna, at vit kunnu føra tað virksemið, sum hevur verið her í so mong ár, víðari á ein hátt, sum eisini tænir umhvørvinum her í Vágsbotni, sigur Óli Kristian á Torkilsheyggi.














WÜRTH